# Hendingaríkt Premier League vikuskiftið

**FÓTBÓLTUR** Manchester United er aftur oddalið og Chelsea líkist einum liðið í upploys

Tróndur Arge – Liverpool

Manchester United er aftur oddalið í Premier League og Dimitar Berbatov stjól yvirskriftirnar fyri fyrstu ferð síðani minniliga hattrickið móti Liverpool tann 19. september á Old Trafford. Eftir tann dystin var Dimitar Berbatov toppskorari í Permier League og hann var lýstur sum tann nýggi Eric Cantona. Síðani hevur hann brent hvønn tann einasta málmøguleika hann hevur fingið og lýsingarorðini vóru ikki longur so vøkur – Berbaflop.

Leygardagin hevði Berbatov fingið nokk og skoraði ikki færri enn fimm mál í knúsandi 7-1 sigrinum á Blackburn. Munurin var bara tann, at Berbatov fyri fyrstu ferð síðani Liverpool dystin, hevði Wayne Rooney við sína lið í álopinum. Sir Alex Ferguson sigur, at Rooney er tann perfekti framherjin at spæla saman við Berbatov. Tað mugu Paul Robinson og Blackburn bara ásanna.

Við at skora fimm mál í sama dysti sleppur Dimitar Berbatova í serstakan felagskap. Ein felagskapur, sum nú telur fýra mans; Alan Shearer, Andy Cole, Jermain Defoe og Dimitar Berbatov. Teir hava allir megnað at skorað fimm mál í einum og sama Premier League dysti. Jóan Símun Edmundsson kundi passandi fari í felagskapin, tá hann eina ferð sleppur framat í Newcastle og so kunnu teir fáa heiti; Teir fantastisku fimm!

### Chelsea í upploysn

Okkurt er ikki sum tað skal vera í Chelsea. Liðið vann í fjør greipuna og byrjaði árið í ár við at vinna fimm teir fyrstu dystirnar og skora eina rúgvu av málum. Á City of Manchester Stadium kom fyrsta tapið og síðni hevur gingið strilti. Vældámdi hjálparvenjarin, Ray Wilkins, var bráduliga koyrdur frá og dystin eftir tapti Chelsea heili 3-0 á heimavølli fyri Sunderland. Undan dystinum móti Newcastle hetta vikuskiftið boðaði ítróttarstjórin, danin Frank Arnesen, frá at hann eisini gevst í felagnum. Chelsea er uttan skøddu undangongumenninar, John Terry og Frank Lampard, sum hava stóra ávirkan á liðið. Í kuldanum í Newcastle megnaði Chelsea at fyribyrgja triðja tapinum á rað við einum 1-1 javnleiki. Tapti Chelsea var tað fyrstu ferð síðani 1997, at liðið tapti tríggjar dystir á rað. Chelsea ikki oddalið longur og tað verða teir ikki aftur, um avrikini og neyvleikin frammanfyri málinum ikki verður betri í framtíðini.

### Tottenham bjóðar av í oddinum

Tá liðini hittust í fjør, var tað í fyrsta umfarinum av Premier League. Liverpool var millum favorittarnir at vinna Premier League, meðan Tottenham var eitt miðal Premier League lið. Í dag stríðist Tottenham millum oddaliðini og spælir í Champions League, meðan Liverpool umvegis niðurflytingarstrikuna liggur í miðjuni í Premier League, umframt at spæla í Europa League.

Tí vildi Harry Redknapp prógva fyri umheiminum, at tað er ein greið orsøk til at støðan nú vendir á høvdinum. Dysturin gjørdist ein tann besti higartil í kappingini og bjóðaði upp á trý mál, tríggjar skaðar, eitt hav av málmøguleikum, eitt brent brotsspark og eitt avgerandi mál í evstu løtu. Bæði liðini kundu havt vunnið dystin, men sigandi fyri gongdina seinasta árið, so var tað Tottenham, ið kom aftur í aftur og vann, meðan Liverpool misti á stokkinum.

### West Ham livir í vónini

West Ham nyttaði snøkt sagt einki á Anfield fyri eini viku síðan. Teir kundu fyri tað sama bara pakka niður og flutt úr Permier League. Men tað var West Ham uttan Scott Parker, tí tað er eitt heilt annað lið. Teir eita tað sama, hava somu troyggjur og spæla sínar heimadystir á Upton Park, men tað er ikki sama liðið. Við Scott Parker sum drívmegi og liðskipara á miðvøllinum gevur hann restini av West Ham ein íblástur, sum kann bjarga London felagnum frá niðurflytingini. Scott Parker átti stóran leiklut í 3-1 sigrinum á Wigan í vikuskiftinum.

*trondur@sosialurin.fo*



**HALLUR HANSSON**
**Føddur:** 8. juli 1992
**Foreldur:** Hans Nielsen og Hanna Mikkelsen
**Feløg:** Hevur umboðað AB, VB og HB
**Sáttmáli:** Hevur sáttmála við Aberdeen til summarið 2011
**Pláss:** Miðvallari hvørs uppgávur eru bæði verjukendar og álopskendar

*Hallur Hansson í dysti fyri føroyska U21-landsliðið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# – Strævnasti hálvleikurin eg nakrantíð havi spælt

**FÓTBÓLTUR** Hallur Hansson fekk í gjár debut í skotsku Premier League, tá hann í hálvleikinum var skiftur inn á miðvøllin hjá Aberdeen. Eitt mál er rokkið og Hallur fer at stríðast fyri at fáa fleiri minuttir á vøllinum hjá Aberdeen, og einum plássi á føroyska landsliðið

Tróndur Arge

Aberdeen liggur næstniðast í skotsku Premier League, og gongdin seinast dystirnar hevur ikki verið góð. Liðið var á vitjan á Rugby Park, ið er heimavøllurin hjá Kilmarnock. Støðan í hálvleikinum er 1-0 til Kilmarnock og Hallur Hansson og hinir útskiftarnir fara á vøllin at hugna sær eina løtu, meðan steðgurin er. Hetta er ikki fyrstu ferð, at Hallur er á bonkinum hjá Aberdeen, so hann kennir mannagongdina. Men hesa ferð er øðrvísi, tí bráddliga kemur hjálparvenjarin rennandi móti Halli.

– Hjálparvenjarin kom yvir til mín og segði at eg skuldi á vøllin. Eg havi fyrr hugsað tankan um hvussu eg skal takla hesa støðuna, tí eg havi verið á bonkinum fyrr, sigur Hallur.

Útskiftingin av Halli fór fram í hálvleikinum, og tí var ikki líka nógv fokus á , sum tað annars er, tá spælari verður skiftur inn, ímeðan spælið er í gongd.

– Eg var ikki nervøsur, men heldur spentur. Tað kann gott vera, at gjørdi tað heila eitt sindur lættari, at eg kom inn í hálvleikinum, sigur Hallur úr Aberdeen.

Hvat segði venjarin við Hall, áðrenn hann á fyrsta sinni steig inn á vøllin sum Aberdeen leikari?

– Hann fortaldi mær hvar eg skuldi spæla og hvørjar uppgávur eg skuldi røkja. Alt er lagt væl til rættis her í Aberdeen, og allir kenna sínar uppgávur. Eg fekk boð um hvønn eg skuldi dekka tá Kilmarnock fekk hornaspark, og hvar eg skuldi standa, tá vit høvdu hornaspark, sigur Hallur Hansson.

Hallur hevur spælt nakrar U-21 landsdystir, men hevur framvegis sín fyrsta A-landsdyst til góðar, og hevur tí ikki roynt seg stórvegis í vaksmanna fótbólti fyrr enn nú.

– Hetta er 100% strævnasti hálvleikurin eg nakrantíð havi spælt. Hetta kann ikki samanberast við at spæla á U-21 landsliðnum. Ferðin er væl hægri, men fái eg fleiri royndir, so klári eg at venja meg við støðið og ferðina, sigur Hallur.

Hallur hevur verið knýttur at Aberdeen í tvey ár, men tað er ikki fyrr enn í seinastuni, at hann er sloppin at royna seg millum teir bestu.

– Besta liðið og U-19 liðið venja um somu tíð, so venjarin, Mark McGhee plagar at velja nakrar frá U-19 liðnum at venja við besta liðnum. Seinastu tveir mánaðirnir havi eg vant við besta liðnum, og tað hevur gingið betri og betri fyri hvørja ferð, sigur Hallur.

Nú er eitt mál rokkið, hvat er so næsta málið hjá Halli?

– Sum fótbóltsspælari hevur tú altíð nøkur mál, men tað er ikki nakað eg hugsi so nógv um í løtuni. Eg royni bara at stríðast og gera mítt besta. Eg kundi sjálvandi hugsa mær at fingið fleiri minuttir á besta liðnum, og so er A-landsliðið sjálvandi eisini eitt mál, sigur Hallur.

Aberdeen tapti dystin 2-0 eftir at hava verið aftanfyri 1-0 í hálvleikinum. Komandi vikuskiftið fær Aberdeen vitjan av Celtic og so er spurningurin um Hallur Hansson aftur verður at síggja á vøllinum.

– Tað er upp til venjarin at avgerða. Eg kann bara gera mítt besta, og vóna at venjarin velur meg eina aðru ferð, sigur Hallur Hansson at enda.

*trondur@soialurin.fo*